## Høllin málað reyð

Karmarnir kundu ikki verið betri, tá liðini fóru á vøllin til triðju finaluna í Klaksvík leygardagin. Fjeppararnir hjá Stjørnuni eru vanliga mælskir, men hesa ferð høvdu tey ordiliga gjørt seg til, soleiðis at desibellini skuldu fara enn longur upp. Við ballónum og bannarum var høllin eisini pyntað til gullveitsluna, sum varð sett ígongd longu ein tíma undan dystinum, tá "Vi maler byen rød" hjá Birthe Kjær varð sendir gjøgnum hátalararnar.



## Kanska rættvíst

Hóast taptu finalurnar, so tóktist Ása á Neystabø ikki heilt ónøgd um avrikið hjá Neistanum í finalunum. – Í dag fáa vit ikki ordiliga glið á okkara spæl. Tað fáa tær í størri mun, og so eydnaðist okkum ikki at taka tær aftur. Kanska kostaði møðin eisini nakað, tí vit skulu renna so nógv í okkara spæli, men eg haldi serliga, at tað var tað, at spælið hjá okkum ikki koyrdi. Hinvegin er tað kanska í lagi, at Stjørnan vinnur, um tú hugsar um, hvussu langt tær vóru á odda. So tað skulu tær hava eitt hjartaligt tillukku við, segði Ása á Neystabø.



*Durita Christoffersen var aftur báðar dystirnar ein sannur brandur í verjuni hjá Stjørnuni. Og í álopinum er hon heldur ikki eiðasør*

*Mynd: Bárður Lydersen*



bjargaði trimum brotskøstum, stóð Stjørnan ímóti.

### Fá mál

Og so gjørdust tað aftur bakkarnir, sum avgjørdu dystin. Durita Ljósstein tóktist darvað av nervum, tá hon tók við á miðjuni eftir skaddu Joan. Men brádliga hevði eisini hon eydnuna við sær í gjøgnumbrotunum. Og tá Joan so kortini treiskaðist og kom á vøllin í seinna hálvleiki, var neyðuga breiddin aftur til staðar.

Tað var hon ikki hjá Neistanum. Og 13 mál í eini finalu siga væl nakað um, hvussu trupul tær høvdu við støðugt at bróta seg ígjøgnum verjuna, eins og at tær spældu móti einum góðum málverja.

Hinvegin eru tað fá lið, sum halda Stjørnuni niðri á 17. Og tað eiga bæði verja og málverji hjá Neistanum stóra æru av.

Neistakvinnurnar megnaðu kanska ikki at basa stórfavorittunum, sum vunnu eitt ruddiliga uppiborið FM-heitið. Men tær bitu nakað nógv meira frá sær, enn tey flestu roknaðu við. Og saman við Stjørnuni góvu tær ársins hondbóltsgávu til áskoðararnar í næstu finaluni.

# Høvdu ryggin móti múrinum

**Henrik Gerster vil ikki siga, at hann var bangin, eftir at Neistin hevði vunnið fyrstu finaluna. Men nervarnir gjørdu sjálvandi um seg, tá hann og Stjørnan stóðu við rygginum móti múrinum**



*Annað árið á rað hevur Henrik Gerster vunnið bæði steypa- og landskapping saman við kvinnunum hjá Stjørnuni*

*Mynd: Bárður Lydersen*

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vóru mong, sum undraðust, tá Henrik Gerster, venjari hjá Stjørnuni, eftir bara 11 minuttum av triðju finaluni valdi at taka time-out.

Fyrstu minuttirnar av dystinum hevði Stjørnan annars sitið á øllum, og tær høvdu eina 3-0 leiðslu móti einum Neista-liði, sum als ikki tóktist vera til reiðar at fara undir ein triðja og avgerandi finaludyst.

Sjálvur segði Henrik Gerster tó eftir dystin, at grøna kortið ikki varð nýtt í ónøgd sum so.

- Tað var meira tað, at vit undan dystinum høvdu avtalað, hvussu álopsspælið skuldi koyra. Ikki minst við at finna tey hol, sum heilt víst fóru at vísa seg í Neista-verjuni. Men tann parturin av ætlanini varð ikki fylgdur, og tað ætlaði eg at rætta.

- Vit eru eitt lið, sum eru vanar at skora eini 10-15 kontra-mál, men Neistin dekkaði ótrúliga væl upp í sínum retur-renningum, og tí gjørdust vit kanska eitt sindur frustreraðir.

### Góð reklama

Og so helt Henrik Gerster annars, at finaludystirnir millum Neistan og Stjørnuna vóru ein ótrúliga góð reklama fyri føroyskan kvinnuhondbólt.

- Dysturin í dag verður avgjørdur av tveimum ótrúliga góðum verjum og tveimum ótrúliga góðum málverjum. Sjálvandi eru 30 mál ikki nógv í eini finalu, men bæði liðini vardu sera væl, og so høvdu hinar finalurnar eisini kostað nógvar kreftir. Vit venjarar eru troyttir mentalt, og spælararnir eru tað ikki minni fysiskt. So har var avgjørt ikki nógv eftir, tá seinastu minuttirnir skuldu spælast. Og tá vóru vit kanska tað lítla petti sterkari enn Neistin.

*Tit taptu fyrstu finaluna. Vart tú ongan tíð bangin fyri, at hetta fór at kiksa?*

- Nei, ikki sum so. Stóri trupulleikin hjá okkum til fyrsta dystin, at vit stórt sæð hava spælt týdningarleysar dystir nú í næstan tveir mánaðir. Vit hava eisini spælt illa, men stigini eru so komin til høldar kortini. Og tí haldi eg ikki, at spælararnir vóru til reiðar at spæla eina finalu móti Neistanum.

- Hartil gjørdu vit eisini somikið nógv mistøk í dystinum í Havn, at tað visti eg ikki kundi henda aftur. Og at enda, so hava vit í Stjørnuni ikki tapt ein heimadyst nú í trý ár. Áskoðararnir her norðuri eru heilt fantastiskir stuðlar í so máta, og tað eru bæði spælararnir og eg ótrúliga fegin um, segði Henrik Gerster.